# Ásetingar fyri øki A2: Miðstaðar- og vinnuøki - serstøk byggisamtykt

**Miðstaðar- og vinnuøki Niðri á Tjørn í Miðvági**

Miðstaðarøkið Niðri á Tjørn í Miðvági, verður broyt til serstaka byggisamtykt miðstaðar- og vinnuøki (A2).
Fyri miðstaðar- og vinnuøki avmerkt við reyðum og skraverað á hjálagda korti, verða hesar serstøku samtyktir galdandi:

1. Økið verður lagt burtur av til miðstaðar- og vinnubygging, t.e. handlar, bilasølur við tilhoyrandi virksemi m.a. umvæling av bilum, vinnubygningar til tænastuvinnu, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur o.t. Í serstøkum førum er loyvt at innrætta íbúð.
2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.
3. Hús kunnu í mesta lagi verða bygd í 2 hæddum umframt loft og skulu annars ikki vera hægri enn 6 m. til yvirgrindina og 8 m. til mønuna, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahornini. Sambært gr. 27 í byggsamtyktini fyri Vága kommumu). Kjallari verður roknaður uppí sum húsahædd, um so er, at loftið er meira enn 1,0 m. yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera.
4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. petti, í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrligt avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.
5. Nærri ásetingar um virksemi vera gjørdir í leigusáttmálunum/ognarbrøvunum fyri hvørt grundstykki.

**Tilvísingar:**

Sí hjáskjøl .

1. Kort sum vísir, hvørji matrikul talan er um.

Víst verður annars til almennu byggisamtyktina.

**Samtyktar- og góðkenningarátekning.**

Soleiðis samtykt av **Vága býráð** tann 12. juni 2017

Eyðdis Niclasen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari

Sambært gr. 4, stk. 1. í løgtingslógini um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinri broytingum, góðkennir Heilsu- og innlendismálaráðið frammanfyristandandi av Vága býráð samtykta uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Vága kommunu.

Heilsu- og innlendismálaráðið ______/_____ 2018